# ítróttur

Nr. 46 • hósdagur • 7. mars 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo


## Julian skoraði í stórsigri

**Julian Johnsson og Hull City vunnu týskvøldið sannførandi á Mansfield, sum er ein av argastu kappingarneytunum í oddinum. Julian skoraði fjórða málið hjá Hull, sum vann 4-1 á heimavølli**

FÓTBÓLTUR
*Stefan í Skorini*

Eftir at Hull City hevur verið í einum aldudali, tykist liðið nú á veg uppaftur. Hull var við í stríðnum um fremstu sessirnar í fyrru hálvu av kappingarárinum, men síðani fór luftin úr ballónini, og liðið datt nøkur pláss niður á stigatalvuni.

Avrikið týskvøldið móti Mansfield, ið liggur á triðja plássi, bendir á, at Hull hevur tikið annað skinn um bak. Navnframi venjarin Brian Little er farin úr felagnum og ungdómsvenjarin, Billy Russell, hevur tikið við sum fyribils venjari.

Hull legði hart út og trýsti Mansfield aftur á vøllin heilt frá byrjan. Hetta gav skjótt úrslit, tí eftir tjúgu minuttir var Hull frammanfyri 2-0.

Fyrsta málið skoraði Lee Philpott eftir fjúrtan minuttir, og stutt eftir økti Gary Bradshaw um leiðsluna. Mansfield var mest sum fyri ongum, tá farið varð til hálvleik.



*Julian Johnsson skoraði týskvøldið fimta mál sítt fyri Hull, sum tykist vera komið úr einum aldudali. Bara níggju dystir eru eftir í landskappingini, sum endar 20. apríl*
*Savnsmynd: Álvur Haraldsen*

### Julian á blettinum

Fýra minuttir eftir steðgin økti David Norris, sum júst var komin á vøllin, til 3-0. Norris er áleypari, sum Hull hevur lánt úr Bolton.

Dysturin dovnaði nakað eftir hetta, og málmøguleikarnir vóru fáir. Mansfield spælararnir fóru at spæla hart og fingu fleiri gul kort fyri grovar takklingar.

Julian Johnsson spældi allan dystin á miðvøllinum hjá Hull, og hann setti krúnuna á verkið tíggju minuttir fyri leiklok. Julian var fyrr á einum innleggi, sum málverjin kom út eftir. Julian setti høvdið á, og bólturin datt í tóma málið.

Hetta var fjórða málið hjá Julian í landskappingini, og hann hevur eisini skorað eitt mál í steypakappingum. Julian hevur spælt tilsamans 40 dystir fyri Hull higartil í ár.

Mansfield fekk pynta um úrslitið nakað seinni, tá Shane Bradley setti bóltin í netið, men Hull vann ein sannførandi sigur frammanfyri 9.158 áskoðarum á Boothferry Park.

Hinir kappingarneytarnir í oddinum vunnu eisini sínar dystir týskvøldið, og Hull er tí framvegis á sætta plássi. Átta stig eru upp til Mansfield á triðja plássi, sum gevur beinleiðis uppflyting til 2. deild. Fýra tey næstu liðini skulu spæla innanhýsis uppflytingardystir, og eitt teirra fer við trimum teimum fremstu til lovaða landið í 2. deild.

Hull hevur bara níggju dystir eftir at spæla, og tað verður tí tungt hjá Julian og liðfeløgum hansara at vinna beinleiðis uppflyting, men teir kunnu eisini dúva uppá uppflytingardystirnar.

### Lokaluppgerð

Leygardagin fær Hull vitjan av Scunthorpe United, sum er ein tann argasti arvafíggindin hjá Hull. Sagt verður, at heilt fá atgongumerki eru eftur til dystin, og væntandi verður hetta best vitjaði heimadysturin hjá Hull í ár. Felagið væntar, at fleiri enn 15.000 áskoðarar taka sess á Boothferry Park leygardagin.

Dysturin hevur stóran týdning, tí Scunthorpe er í løtuni tvey stig frammanfyri Hull, sum tískil kann fara framvið grannunum við einum sigri.

## Christian Høgni fær kappingarneyta

**Vejle hevur gjørt leiguavtalu við stóran brasilskan álopsspælara, sum er á veg úr Japan og í bestu deildina í Italia**

ÚTISETAFELAG
*Jóannes Hansen*

Í fyrsta umfarinum í donsku superliguni eftir vetrarsteðgin var Christian Høgni Jacobsen fyri fyrstu ferð í álopinum hjá Vejle. Eftir at hann hevði verið í felagnum í ein mánað, hevði hann megnað at vunnið sær pláss ímillum teir fyrstu ellivu, og tað má metast at vera væl klárað.

Christian Høgni Jacobsen skoraði ikki í 5-2 sigrinum á útivølli ímóti Lyngby. Sunnudagin fer føroyski landsliðsmaðurin vónandi at fáa ein nýggjan møguleika at vísa venjaranum, hvør dugur er í honum. Tá skal Vejle spæla á heimavølli ímóti FCK og Toda Jónsson. Síðani málleysa javnleikin ímóti AGF í Parkini hevur Todi Jónsson verið eitt sindur eymur í lærinum, men hann tykist vera klárur at spæla. Hesa ferð fer hann ivaleyst at hava Zuma, sum var leikbannaður ímóti AGF, undir liðini á sær í FCK álopinum.

Dysturin millum tey bæði føroysku feløgini í donsku superliguni verður sunnudagin at síggja á TV3+ sjónvarpsrásini.

### Kappingarneytin

Í fyrradagin boðaðu teir í Vejle frá, at teir hava gjørt avtalu við ein nýggjan álopsspælara. Tað vil við øðrum orðum siga, at Christian Høgni Jacobsen hevur fingið meiri kapping um plássini í Vejle álopinum.

Talan er um ein bras-ilskan álopsspælara. Hann eitur Jader Spindler. Ofta hava brasiliumenninir eitt navn eyka ella eitt kelinavn. Soleiðis er tað eisini við hesum fótbóltsspælaranum, sum verður nevndur Baré. Fótbóltsspælarar úr Brasilia eru ofta smáir og léttbeintir. Sambært donsku fjølmiðlunum í gjár so er nýggi álopsmaðurin hjá Vejle ikki av hesum slagnum.

Baré er 191 centimetrar høgur, og hann vigar 81 kilo. Tað verður sagt, at hann er skjótur og sterkur, og at hann hevur góðan bóltførleika. Í Japan hevur hann prógvað, at hann hevur máltev. Í 20 dystum hevur hann skorað 13 mál.

Vejle hevur gjørt leigusáttmála við 20 ára gamla álopsspælaran, sum verður í Danmark inntil danska kappingin verður liðug í mai mánað. Tað er longu greitt, at brasiliumaðurin ikki verður liðfelagi hjá Christian Høgna Jacobsen eftir summarfrítíðina. Hann hevur gjørt sáttmála við Brescia, sum spælir í bestu deildini í Italia. Tað átti at boða frá, at tað eru knotur í manninum. So fæst at síggja, um tað verður pláss fyri bæði honum og Christian Høgna Jacobsen í Vejle álopinum.

### AaB undir liðini á FCK

Mánakvøldið var lokaluppgerð í Norðurjyllandi í superliguni. AaB vitjaði í Viborg, og gestirnir fóru avstað við øllum trimum stigunum. Eftir at heimaliðið hevði lagt bragdliga fyri og hevði víst gott og hugflogsríkt spæl, megnaði AaB at spæla seg upp. Í Viborg iðraðu teir seg um, at avrikið hjá teimum ikki bar í hvussu so er eitt stig við sær.

AaB vann 1–0, og málinum bilti avgjørt einki. Miðvallarin Stefan Bidstrup smekkaði til úr 25 metra fjarstøðu, og bólturin smoygdi sær dygst inn undir samankomingina.

At AaB fekk øll stigini ber við sær, at teir eru undir liðini á FCK, sum á øðrum plássi er níggju stig aftanfyri oddaliðið Brøndby. Viborg er framvegis í vanda fyri at flyta niður.



## Rógvi Johansen gjørt sáttmála

**Vágbingurin Rógvi Johansen hevur aftur í ár skrivað undir sáttmála við Cycling Aarhus Elite, og hann fer at koyra á besta liðnum eins og í fjør**

SÚKKLING
*Stefan í Skorini*

Rógvi Johansen venur nú aftur við fullari megi eftir álvarsama skaðan, hann fekk í september mánaða í fjør í Herning. Hann var tá illa meiðslaður og gekk á høkjum í langa tíð.

Hann hevur samstundis skrivað undir sáttmála við Cycling Aarhus Elite, og hann fer at súkkla við besta liðnum eins og í fjør.

Rógvi sigur úr Aarhus, at hann var í ómetaliga góðari venjing og fekk góð úrslit undan óhappinum í Herning, sum tí kom ógvuliga illa við.

Vágbingurin er sera uppsettur til komandi kappingarár, tó hann skal framvegis ganga til kanningar á ítróttarligu læknastovuni í Aarhus.

Rógvi skal vera við á liðnum til allar vanligar kappingar í Danmkar, og hann skal eisini vera við til UCI kappingarnar, sum eru størri kappingar við yrkissúkklarum. Harumframt skal hann luttaka í DM 2002, og her er tað serliga einkultstarturin, sum hann leggur seg eftir, men hann skal eisini vera við í liðkappingini og í kappingini á landavegnum.

Rógvi verður væntandi við í Statoil Kring Føroya kappingini, sum verður í summar, hóast hann í kappingini í fjør varð noyddur at taka seg úr, tí ósemja stóðst millum fyrireikararnar av kappingini og Rógva.

## Grand Prix í badminton

BADMINTON
*Stefan í Skorini*

Seinasta vikuskiftið var endaumfarið í Grand Prix kappingini í einmansleiki í badminton leikt í ítróttarhøllini í Vestmanna.

Úrslitini vóru hesi:

**Gentur 11 ár:**
1. Agnas Olsen, VÍF
2. Hanna Elisa Óladóttir Arge, HBF
3. Fjóla Luid, HBF

**Gentur 13 ár:**
1. Óluva Bærentsen, ÍF
2. Brynhild Carlsson, HBF
3. Guðrun Lervig, ÍF

**Gentur 15 ár:**
1. Ulla í Dávastovu, VÍF
2. Rannvá á Rógvu, VÍF
3. Nicola Gram, MBF

**Kvinnuunglingar:**
1. Guðrun Poulsen, VÍF
2. Fríða Næs, ÍF
3. Elisabeth Petersen, VÍF

**Dreingir 11 ár:**
1. Bogi Reinert Petersen, ÍF
2. Ari Ellingsgaard, ÍF
3. Magnus á Rógvu, VÍF

**Dreingir 13 ár:**
1. Filip Gram, MBF
2. Reidar Luid, HBF
3. Sigurd Carlsson HBF

**Dreingir 15 ár:**
1. Niclas Eysturoy, HBF
2. Rógvi Poulsen, HBF
3. Bjarki Kristian Gram, HBF

**Mansunglingar:**
1. Gunnar Poulsen, HBF
2. Høgni Madsen, ÍF
3. Sverri Ellingsgaard, ÍF



*Dreingir 13 ár: 1. Filip Gram, MBF, 2. Reidar Luid, HBF, 3. Sigurd Carlsson HBF*



*Gentur 11 ár: 1. Agnas Olsen, VÍF, 2. Hanna Elisa Óladóttir Arge, HBF, 3. Fjóla Luid, HBF*



*Dreingir 11 ár: 1. Bogi Reinert Petersen, ÍF, 2. Ari Ellingsgaard, ÍF, 3. Magnus á Rógvu, VÍF*



*Gentur 13 ár: 1. Óluva Bærentsen, ÍF, 2. Brynhild Carlsson, HBF, 3. Guðrun Lervig, ÍF*

Holte-Gentofte 3-2
(21-25, 24-26, 25-16, 25-19, 18-16)

## Holte vann ein gysara

**Bárður Mikkelsen vann við liði sínum Holte ein sera spennandi og avgerandi dyst móti Gentofte Volley týskvøldið. Eftir at hava verið aftanfyri 2-0 vendi Holte gongdini og vann 3-2**

FLOGBÓLTUR
*Stefan í Skorini*

Hesin dysturin var sera avgerandi fyri báðar partar í stríðnum um at koma víðari til hálvfinalurnar. Hvørki av liðunum hevði ráð at tapa.

Holte hevur havt gott tak á Gentofte í ár og hevur vunnið allar dystirnar 3-0, men hesuferð fingu Bárður og teir stinna mótstøðu.

Gentofte vann tvey tey fyrstu settini við úrslitunum 25-21 og 24-26. Holte var nú kroyst og skuldi vinna tey næstu trý settini fyri at vinna. Hetta megnaðu liðfelagarnir hjá Bárði í einum braki av einum dysti, sum kanska kann kallast ársins dystur. Dysturin vardi í einar tveir tímar, og menn vóru útlúgvaðir eftir dystin.

### Javnur dystur

Tvey tey fyrstu settini, sum Holte tapti, vóru sera jøvn. Liðini fylgdust allan vegin, men móti endanum gjørdi Holte nøkur mistøk, sum kostaðu teimum settini.

Holte skuldi vinna dystin, tí annars var hálvfinaluplássið í vanda. Venjarin gjørdi tríggjar flytingar á liðnum og setti Bárð inn sum hevara. Tað tyktist eisini sum mótstøðuliðið longu hevði kannað sær sigurin, og hetta gav Holte møguleika at koma innaftur í dystin.

Bárður kom væl frá uppgávuni sum hevari, og hann gav liðnum eitt annað flog. Hann noyddist tíverri útaftur í fjórða setti vegna ein knæskaða, ið hevur darvað honum eina tíð.

Fimta settið mundi geva fleiri hjartatrupulleikar, tí hetta gav áskoðarum meira spenning enn gott er.

Gentofte leggur seg beinanvegin framum 0-4. Liðini fygljast síðani til 7-11, tá Holte tekur dik á seg og javnar til 11-11. Gentofte tekur seg síðani uppá 11-14 og hevur tríggjar bóltar at avgera dystin til egnan fyrimun.

Holte vinnur tó fýra bóltar á rað og hevur síðani ein matchbólt. Gentofte tekur seg tó aftur framum til 15-16 og hevur sín fjórða møguleika at avgera dystin. Holte svarar tó aftur og vinnur seinasta settið 18-16.

Við sigrinum tekur Holte seg uppá næstfremsta plássið, nú bara tvey umfør eru eftir. Men tað er sera javnt, tí Holte hevur átta stig saman við tveimum øðrum liðum.

Komandi sunnudag fær Holte vitjan av oddaliðnum HIK úr Aalborg, ið hevur fjúrtan stig, og sum ikki hevur tapt nakran dyst í ár. Tað er av stórum týdningi hjá Bárði og teimum at vinna henda, tí so sleppa teir undan at møta HIK í hálvfinaluni.